# Ov nógv ferð koppaði treylaranum



*Hesin stóri treylarin koppaði við Kjalnestanga í Kollafirði. Landsvegurin varð stongdur í fleiri tímar, tí uppruddingararbeiðið var drúgt*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

FERÐSLUÓHAPP
*Stefan í Skorini*

Týsdagin koppaði ein stórur treylari við Kjalnestanga í Kollafirði. Akfarið hevði ov nógva ferð í tí stóra svinginum, og hetta hevði við sær, at pakningurin í lastini flutti seg. Pakingurin, sum skuldi til eitt flakavirki, var helst ikki festur nóg væl, og tá bilurin hevði ov nógva ferð, so koppaði bilurin.

At byrja við var bara tann eina farbreytin stongd vegna óhappið, men tá menn fóru at rudda upp klokkan 15.30, varð landsvegurin stongdur. Ferðslan var ístaðin beind inn á bygdavegin. Uppruddingin var ikki liðug fyrr enn klokkan 19.

Lastin var innilokað, men pakningurin fór útígjøgnum veggin. Pakningurin lá sløddur oman ímóti fjørðuni, so tað sá heldur dramatiskt út.

Førarin varð fluttur á sjúkrahúsið við smærri snuddum.

## Amerada Hess fingið pall

Seinnapartin týsdagin tók Amerada Hess yvir boripallin Sovereign Explorer frá Statoil. Pallurin verður nú fluttur teir umleið 17 fjørðingarnar suður til boristaðið hjá Amerada Hess samtakinum, ið verður nevnt Marjun. Eftir ætlanini verður byrjað at bora seint í hesi vikuni ella tíðliga í næstu viku.




Laaaannngt vikuskifti í Keypmannahavn

hósdag til mánadag...ja! 1.995,- *)




**Galdandi til 28. oktober**

Undirhald, søga og hugni. Keypmannahavn hevur alt. Unna tær sjálvum eina fríløtu frá gerandisdegnum. Eitt vikuskifti, har tú tekur tær av løttum. Spáka tær ein túr á Stroynum, keyp inn, stuttleika tær í Tivoli, ella fáa tær ein góðan bita í Nýhavnini. Alt ber til í deiligu Keypmannahavn.

Tú fert úr Vágum hóskvøld kl. 20.40. Tú fært sostatt arbeitt allan hósdagin, og tú hevur allan fríggjadagin í Keypmannahavn.

Atlantic Airways hevur nú hesar eykatúrar:

| | | |
|---|---|---|
| Til Keypmannahavnar: | hóskvøld | 20.40 |
| Til Føroya: | fríggjadag | 08.55 |
| Til Keypmannahavnar: | sunnukvøld | 17.30 |
| Til Føroya: | mánadag | 07.45 |

*) Ferðaavgjald sum er kr.365,- kemur afturat prísinum

SANSIR · TEL 355 355

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo



FØROYSKT LAMB
sett í hásætið í Restaurant Hafnia

STÓR LESKILIG BUFFET
har m.a. besta úrval úr føroyskum lambsrættum eru at velja ímillum.

Etið so nógv tygum orka av køldum og fløgum rættum og royni okkurt leskiligt omaná -



fyri bert 175,- børn u/ 12 ár ókeypis

Fríggjad. 21. sept., leygard. 22. sept. & sunnud. 23. sept. frá kl. 18.00 - 21.30

Verið vælkomin á Hafnia - biðið um borð á tel 31 32 33 lokal 519

Hotellið í miðbýnum
Tel 31 32 33